# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO

*- Tað kann væl vera, at Benitez er nøgdur við at tapa 1-0, men vit eru eisini nøgdir um úrslitið*

*Jose Mourinho, Chelsea*

# FM-venjarin steðgar

**Jónleif Sólsker, sum í fjør førdi mansliðið hjá Kyndli til FM-gull, verður ikki venjari komandi kappingarár. Ábendingar eru um, at Dia Midjord verður nýggjur í sessinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Við til samans ellivu FM-heitum í vaksnamannahondbólti er Jónleif Sólsker avgjørt millum teir mest vinnandi í føroyskari hondbóltssøgu.

Gullið í fjør var tó tað fyrsta, at har hann virkaði sum venjari burturav, men hóast góða úrslitið, so verður tað ikki Jónleif, sum stendur á odda fyri liðnum næsta kappingarár.

- Tað ber illa til hjá mær í løtuni at fáa eitt venjarastarv at sampakka við borgarliga starvið, og tí havi eg valt at taka ein steðg frá hondbóltinum, sigur Jónleif.

### Dia sum avloysari

Enn hevur Kyndil ikki sett avloysaran fyri Jónleif. Tað hevur tó ljóðað, at Dia Midjord, sum seinnu árini hevur vant VÍF, verður nýggjur maður í sessinum saman við Sophus Dal Christiansen.

Enn eru hesi tíðindi tó ikki váttað í felagnum, men samráðingar hava verið við venjaran, sum ætlandi skal taka við, verður sagt.



*11. FM-gullið hjá Jónleif kom til høldar, tá hann sum venjari leiddi Kyndil til finalusigur móti VÍF. Men tað verður tó ikki við honum, at Kyndil skal verja gullið komandi kappingarár*

Dia hevur sum einasti føroyski venjarin EHF-venjaraprógv. Sum spælari var hann í fleiri ár dyggur stuðul hjá Kyndli, har hann eisini hevur verið venjari. Seinnu árini hevur tað tó verið hjá Neistanum og hjá VÍF, at hann hevur roynt seg. Hjá vestmenningum var hann fyri tveimum árum síðani við til at vinna FM-gull. Hartil var hann bæði í fjør og í fyrraárið tapandi partur í finaludystinum, eins og hann fyri fýra árum síðani gjørdist akkurát ov stuttur við Neistanum. Í øllum trimum førunum við Kyndli sum FM-vinnara.

GÍ-KÍ 1-4 (longd leiktíð), 1-1 (1-0):

# Hornaspørk sendu KÍ víðari

**Eftir longda leiktíð siga tølini, at KÍ fór við sannførandi steypasigri úr Sarpugerði, men tað tók sína tíð at fáa bilbukt við GÍ, sum leingi var á odda**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

KÍ er við í hattinum í lutakastinum til fjórðingsfinalurnar í steypakappingini. Tað varð greitt mikukvøldið, tá ið GÍ og KÍ í tveir klokkutímar høvdu tikist í ljósum veðri og fittum loti longs eftir vøllinum.

### Villumál

Gøtumenn høvdu vindin undan í 1. hálvleiki, og tá ið eitt stórt korter var farið, løgdu teir seg á odda. Niclas Niclasen sendi fríspark av miðstrikuni og upp um Mathias Samuelsen, sum var komin út úr málinum og hevði roknað eitt sindur skeivt. Bólturin brast í stólpan, men Jónreid Dalheim var fyrstur á returinum.

Spælið var ikki serliga skipað – eisini tí tað var darvað av vindinum – og málmøguleikarnir, sum vóru í báðum endum, stóðust viðhvørt av ikki altíð so sannførandi verjuspæli. Men tað vóru eisini væl spæld álop, sum ikki góvu mál, tí málverjarnir bjargaðu væl.

Eftir steðgin hjálpti lotið KÍ, sum eisini megnaði betri skipað spæl. Serliga tí Jan Andreasen varð fluttur fram á verjukenda miðvallarplássið, har hann stóð seg stak væl.

KÍ javnaði í 65. minutti. Heðin á Lakjuni sendi høgra úr hyøgru til handara stólpan, har Símun Joensen stakk seg longri upp enn stóru miðverjarnir hjá GÍ og málverjan.

Klaksvíkingar trýstu fyri at fáa sigursmálið, men teir megnaðu ikki at umseta lítlu leikliguyvirvágina til úrtøku.

### GÍ misnýtti

Beinanvegin í longdu leiktíðini hevði innskifti Jóhan Dávur Højgaard risa møguleika at leggja heimaliðið framum, men stútarin fór við síðuna av málinum.

Útiliðið vísti seg sum tíðin leið at hava størri breidd og tyngd, og tríggjar teir síðstu minuttirnar av fyrra korterinum í longdu leiktíðini skoraðu teir tvey mál – bæði eftir hornasparksinnlegg úr vinstru.

Í fyrra førinum fór bólturin yvir í høgra borð til Harley Bertholdsen, og Paul Clapson legði seg og fluktaði innleggið í málið. Í seinna førinum varð bólturin sendur einar tíggju metrar út um brotsteigin. Mitt fyri málinum heilfluktaði Harley Bertholdsen í málið.

Síðstu løtuna royndi GÍ at flyta fólkið fram, men Gunnar Nielsen fekk seinasta orðið, tá hann sneiddi framvið málverjanum og staðfesti 4-1 sigurin.

### Dýrt vunnin

Hjá KÍ kann sigurin vísa seg at vera dýrt vunnin. Leon Bjartalíð og Kaj Ennigarð fóru skaddir av vøllinum, og tað kann væl vera, at Kaj Ennigarð, sum higartil hevur verið sannur brandur, ikki verður førur fyri at spæla næstu dagarnar. Á kredit síðuni var tað hugaligt hjá teimum at staðfesta, at Kareem Smith endiliga tykist vera við at koma seg og sum miðverji stóð seg væl.

# Úr Kvívík til Havnar

**Kristi himmalferðardag verður sonevnt adventurerace fyri lið**

ÍTRÓTTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tvær rutur eru, sum kappast verður eftir. Tann strævnara av hesum er um 30 km, og á vegnum eru fleiri avbjóðingum til bæði likam og sál.Lættara rutan er nakað styttri og við nakað nógv færri avbjóðingum.

Felags fyri avbjóðingarnar er tó, at hesar skulu loysast av luttakandi liðunum. Fýra persónar eru á hvørjum liði.

Tilmelding til tiltakið fer fram við at senda teldubræv til hansi@altfyrieitt.fo, og er freistin fyri tilmelding sett til tann 11. mai.

# Bøtur til Roma og Manchester

Rok var á áskoðaraplássunum, tá Roma og Manchester United spældu fyrru fjórðingsfinaluna í Champions League. UEFA hevur nú viðgjørt tilburðin, og bæði feløgini eru sektað við bót. Tí størru av hesum fekk Roma, sum skal rinda 350.000 kr. Manchester United er dømt at rinda 160.000 kr. Feløgini hava enn ikki gjørt av, hvørt tey taka við revsingini.

**-mørk**